# nógv at geva hvørjum øðrum



*Frá vinstru Bjarni Petersen, Annfinn Olsen, Jógvan Martin Olsen, Eduardo Gómex, Sanchez Gutti, ráðgevari, Bogi Eliasen, Ernesto Pinto Basurco ambassadørur fyri Evropa, danskur konsul, José Antonio Oleachea, varakonsul, Pedro Oleachea og Eduardo Pastor ráðgevari*

vit fara út um landoddarnar, er tað sjálvsagt, at vit eisini hugsa um føroyskt vinnulív.

## Stúra ikki fyri at verða kollrend

Bogi Eliasen sigur, at tað vísur seg, at myndugleikarnir í Peru, eru sera áhugaðir fyri samvinnu við Føroyum.

Í hesum sambandi er støddin á Føroyum ein stórur fyrimunur.

– Føroyar eru so lítlar, at tað er ongin vandi fyri, at vit fara at renna Peru um koll, heldur ikki á fiskivinnuøkinum, hvørki í íløgum, ella við at senda fiskiskip í hópatali til Peru at fiska.

– Hetta hevur víst seg at vera ein stórur fyrimunur hjá okkum.

Í Peru hevði Bogi Eliasen m.a fundir við uttanríkismálaráðið og uttanríkishandilsmálaráðið um møguleikar fyri eini fríhandilsavtalu við Føroyar. Hann hevði eisini fund við Fiskimálaráðið, sum er ein deild undir Framleiðslumálaráðnum og Framleiðslumálaráðið um samstarv á fiskivinnuøkinum og øðrum vinnuligum økjum. Hann hevði eisini fund við menningarmálaráðið.

Og Bogi Eliasen ivast ikki í, at tað eru avgjørt møguleikar hjá føroyskari fiskivinnu og føroyskum vinnulívi annars at samvinna við Peru.

– Peru hevur eina strandalinju upp á 2400 kilometrar og havið uttanfyri er eitt tað ríkasta av øllum. Tað ger Peru til næststørstu fiskivinnutjóð í heimi. Tey fiska einar 20 ferðir so nógv sum Føroyingar, men kortini er fíggjarliga avkastið í fiskivinnuni í Peru ikki meiri enn tvær ferðir so stórt sum í Føroyum. Harafturat verður lítið fiska uttanfyri 30 fjórðingar.

Somuleiðis hevur tað eydnast teimum í Peru illa at menna strandaøkini og tað eru eini 25% av fólkinum í Peru, sum ikki fáa nóg mikið av proteinum. Samstundis fer tað mesta av fiskinum til mjøl.

– Tí er alstórur áhugi í Peru fyri at fáa samtarv við útlendingar, sum kunnu seta rættiliga ferð á ein menning í fiskivinnuni fyri at fáa meiri fisk virkaðan til matna.

Bogi Eliassen sigur, at peruvianarar eru eisini áhugaðir fyri at fáa samtarv ið Føroyar um aling í feskum vatni.

Men hann heldur, at tað eru eisini aðrir møguleikar í Peru.

– Fáa vit eitt samstarv í lag á einum øki, kann tað skjótt føra við sær, at tað eisini fer at kasta nakað av sær til avleiddar vinnur. Fáa vit eitt fiskivinnusamstarv á føtur, kann tað eisini kasta nakað av sær til maskinverkstaðir, smiðjur, trolvirki o.s.fr.

Og so eru tey í Peru akkurát byrjaðir upp á eina oljuvinnu og hetta kundi eisini verið ein møguleiki hjá føroyingum at fingið eitt samstarv á tí økinum.

– Tað eru nógv virki í Føroyum sum fyrireikaðu seg til oljuvinnuna her um okkara leiðir, men her stóð veruleikin ikki mát við vónirnar og sostatt eru fleiri av hesum virkjum, sum ongantíð sluppu reiðiliga ígongd. Men Í Peru kundi tað avgjørt eisini verið ein møguleiki hjá hesum virkjum.

– Í eini samvinnu ímillum Føroyar og Peru kunnu báðir partar fáa nógv burturúr. Í Føroyum hava vit vitanina og vit hava tøknifrøðina. Í Peru hava tey rávøruna og tey hava arbeiðsmegina, so tað eru avgjørt møguleikar.

Fyribils hava tey eina ítøkiliga verkætlan í kikaranum. Tað er at gera mjøl, sum er vunnið burturúr høgguslokki, til eitt slag av kornflykrum til fátæk børn, sum ikki fáa nóg mikið av proteinum.

Hetta er eitt samstarv við eitt universitet í Peru.

Ein annar tanki, sum sum hevur verið frammi, er at gera eitt stór-flakavirki í Peru, sum vit kenna tað úr Kina.

Alt hetta verður nú kannað.

Ætlanin er somuleiðis at hava starvsfólkaumbýti og fríhandilssáttmála sum partar av samstarvinum við Peru, umframt at arbeitt verður við nágreiniligum menningarverkætlanum og fyri at føroyingar kunnu fiska í peruvianskum sjóøki.